gult2 cyan2 magenta2 svart2



# Kapping gagnar brúkaranum

**Fáa nýggju telefeløgini í Føroyum stóran part av marknaðinum, kann landsstýrið áleggja teimum veitingarskyldu, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður**

SAMSKIFTI
*Eyðun Klakstein*



*Bjarni Djurholm heldur, at tað er ein fyrimunur fyri brúkarar í øllum landinum, at kapping er á teleøkinum*

Kappingin millum telefeløgini í Føroyum hevur higartil prógvað, at hon er frægasta amboð til at tryggja bestu og bíligastu tænastuna til brúkarnar.

Hetta sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, í svari til fyrispurning frá Henrik Old um teletænastuna í útjaðaranum.

– Menningin í dag fer sera skjótt fram og er til fyrimuns fyri brúkaran, bæði tá talan er um fjøltáttan av tænastum og lægri kostnað. Tøkniliga menningin og kappingin ger eisini, at teletænasturnar í stóran mun longu koma øllum til góða, sigur Bjarni Djurholm.

Landsstýrismaðurin heldur sostatt ikki, at útjaðarin verður verri fyri, hóast kappingin millum telefeløgini á teimum stóru plássunum harðnar, og at Føroya Tele tí fer at hava færri pengar til útbyggingar kring alt landið.

## Vanlig telefon

Í løtuni er tað Føroya Tele, sum hevur veitingarskyldu mótvegis øllum føroyingum.

Veitingarskyldan umfatar vanligt telefonsamband, og harvið eisini møguleikan at brúka seint internet og at senda og taka ímóti faxum. ISDN er eisini umfatað av veitingarskylduni, um minst 10 fólk í somu bygd vilja hava ISDN.

– Veitinginarskylda kann tó ikki krevjast, um kostnaðurin fyri tænastuna er órímiliga høgur, sigur Bjarni Djurholm.

Fartelefonir eru ikki umfataðar av veitingarskylduni hjá Føroya Tele, og at fingið allar Føroyar umfataðar av GSM-neti hevði verið sera kostnaðarmikið, sigur landsstýrimaðurin.

Tí kunnu smáu plássini ikki rokna við øllum teimum tænastum, sum meginøkið hevur, men landsstýrismaðurin heldur, at tøkniliga kappingin eisini gagnar útjaðaranum og tænastuni til hann.

## Fáa somu tænastu

Bjarni Djurholm vísir eisini á, at um tey nýggju telefeløgini – Kall og Tele F – vinna ein trivaligan part av føroyska marknaðinum, so kann landsstýrismaðurin áleggja teimum ávísar veitingarskyldur.

Hetta er ein partur av loyvunum, sum tey hava fingið, og Bjarni Djurholm upplýsir, at um nýggju telefeløgini fáa ein fjórðing av marknaðinum verða tey mett sum týðandi televeitari.

Henrik Old spurdi í sínum fyrispurningi, nær allir landsins borgarar fáa teletænastu á sama høga stigi, sum brúkarar í miðøkinum.

Bjarni Djurholm svarar, at felstu teletænasturnar longu í dag verða veittar til allar borgarar í landinum.


50 ár 50 ár

Móttøka

Í sambandi við at tað týsdagin 1. mai eru 50 ár síðani

Leivur Ellingsgaard

byrjaði virksemi sítt í Klaksvík verður móttøka í Skálanum frá kl. 17⁰⁰ til 19⁰⁰

Øll eru hjartaliga vælkomin

Sp/f Leivur Ellingsgaard
700 Klaksvík

VASTI 457171




*Fólk í Svínoy, Dali, Froðba og aðrastaðni í landinum fáa í hesum árinum møguleikan at brúka GSM-fartelefonir*

# GSM-netið byggjast út

**Føroya Tele ætlar at seta fleiri enn 20 nýggjar GSM-støðir upp kring landið í ár**

GSM
*Eyðun Klakstein*

Føroya Tele fer í hesum árinum at gera stór útbygging av GSM-netinum, og telefelagið hevur lat eina ætlan fyri, nær tær ymsu støðirnar skulu setast upp.

Samanlagt verður talan um 22 nýggjar støðir kring landið.

Í hesum og næsta mánaði verða støðir settar upp í Kvívík, Tjørnuvík, Flogvøllinum, Kunoy, Mikladali, Funningsbotni, Havn og í Funningi.

Í juni mánaði standa Froðba, Øravík og Sandvík fyri tørni. Í juli mánaði skulu støðir verða settar upp í Fámjin og Húsavík. Í august í Árnafirði og við Gjógv.

Í september og oktober mánaði verða støðir settar upp í Haldórsvík, á Hvítanesi, í Lamba, Æðuvík, Dali, Haraldssundi og í Svínoy.

Føroya Tele sigur, at tíðarætlanin er vegleiðandi, og at í flestu førum væntar telefelagið, at tað kann ganga skjótari við uppsetingini. Eisini roknar Føroya Tele við, at støðirnar verða fleiri í tali, tá útbyggingin í ár er liðug.


Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum vístu okkum samkenslu og hjálpsemi, tá okkara høgt elskaði maður, pápi, verpápi og abbi

Poul Nicolaj Jacobsen
f. 04.08.27 d. 22.03.01.

var sjúkur, doyði og varð jarðaður.
Tøkk til starvsfólkini á E3 fyri tíðina hann var hjá tykkum og tøkk til starvsfólkini á B6, sum hjálptu honum og vóru um hann síðstu tíðina hann livdi.
Tøkk øll tit, ið komu í kapellið. Tøkk til prest og tey vøkru og væl valdu orð í kapellinum og í kirkjuni.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og urguleikara, og tit, sum hjálptu til við ervinum.
Tøkk fyri heilsanir, uppringingar, blómur og kransar, og takk tit mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*

**Asta, Sigrun, Djóni og Marianna**


gult3 cyan3 magenta3 svart3



# – Hetta er spennandi

**Nikolina Olsen verður forkvinna í stýrinum, sum skal endurreisa mentanarhúsið Atlantis**

MENTAN
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Tað verður ein kvinna, sum fer at standa á odda fyri nýggja stýrinum fyri sjálvsognarstovnin Atlantis.

Mentanarhúsið skal nú fáast at virka veruliga aftur, og eitt trímannastýri fer at hava ábyrgdina av virkseminum í húsinum.

– Hetta er spennandi. Tað er ein stór avbjóðing at fáa eitt slíkt hús at virka, men eg stúri ikki fyri at fara í gongd við hesa uppgávuna, sigur Nikolina Olsen.

Hon hevur lisið enskt og danskt á universitetinum í Århus, og hon starvast nú sum lærari á studentaskúlanum á Kambsdali. Hon býr í Klaksvík.

Umframt Nikolinu er Jógvan Ravsfjall, savnsvørður á Norðoya Fornminnasavni, valdur í stýrið. Triðja limin skal Norðoya Sparikassi velja, men hesin er ikki valdur enn. Tað verður tó fyrsta dagin, sigur stjórin í Norðoya Sparikassa.



*Nikolina Olsen verður forkvinna í nýggja stýrinum fyri mentanarhúsið Atlantis*

# Merkið umboðar ongan stat

**Hóast føroyingar eru stoltir av Merkinum, umboðar tað framvegis ongan sjálvstøðugan stat, segði Eyðun Elttør í flaggdagsrøðu síni í Klaksvík**

MERKIÐ
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Nógv fólk var til flaggdagshaldið í góðveðrinum í Klaksvík mikudagin.

Skrúðgonga fór úr Klaksvíksgarðinum og endaði í Vágstúni, har Eyðun Elttør, landsstýrismaður, helt røðu.

– Hóast vit eru stolt av Merkinum, so umboðar tað ongan stat. Tað umboðar eitt fólk og eina tjóð. Ein tjóð, sum ikki enn hevur vunnið sær fult tjóðarfrælsi, og sum framvegis ikki tykist vera til reiðar at krevja sín rætt millum heimsins stjálvstøðugu lond, segði Eyðun Elttør millum annað.

– Viðhvørt restar Merkið, tá fløggini verða vundin á stong í altjóða høpi. Fløggini hjá frælsum tjóðum eru uppi, men Merkið er ikki millum teirra.

– Sjálvur tók eg fyri ikki so langari tíð síðani lut á ráðstevnu, har Markið ikki varð vundið á stong, fyrr enn vertirnir vórðu gjørdir varugir við, at Føroya hava egið flagg, segði Eyðun Elttør.

Skótarnir í Klaksvík stóðu fyri flaggdagshaldinum, og Klaksvíkar Hornorkestur var eisini við.


BENETTON barnaklæðir
Til øll børn í aldrinum 0-12 ár



SOSIALURIN 311820

UNITED COLORS OF BENETTON.

Sverrisgøta 17 • 100-Tórshavn • Tel. 317661





**Stórt maitilboð av køkum og hvítvørum**
**Spar upp til 35%**

Vit kunnu eisini bjóða tær at bíleggja køkin nú og tær nýtist ikki at móttaka hann fyrr enn í september.

...tú fært tað munandi betri hjá HTH

HTH Køksmiðstøðin

Á Hálsi • FO 100 Tórshavn • Tel. 314949 • Fax 311330 • www.hth-kokar.com